# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Sjúk samfeløg her og har

Eingin dagur fer framvið uttan vit frætta um dráp og morð, har skotvápn eru brúkt. Vit hoyra um hesi í miðlunum, og í øðrum hvørjum filmi vit síggja eru skotvápn partur av høvuðsboðskapinum. Hesi eru so vanlig, at tey eru vorðin náttúrlig og næstan menniskjanslig. At brúka skotvápn í nærum øllum dagsins viðurskiftum er bara in, tað er feitt.

Neyvan slepst undan stríðum og kríggjum í hesum heimi, tó at vit øll kunnu gera okkara til tess at minka um hesi. Hvussu torført tað tó er sæst í tí herjaða Gaza, har ein av heimsins hernaðarligu sterkastu tjóðum, Ísrael, í sínum stríði móti palestinska Hamasfelagsskapinum eisini er við at gera av við hundraðtals sakleys børn og kvinnur við teimum mest avanseraðu og óhugnaligu vápnunum, sum vápnaídnaðurin hevur framleitt.

Vit hava mangan sæð, hvussu mong av hesum somu børnum verða misbrúkt og upplærd í vápnabrúki heilt frá ungum árum. Vit hava eisini sæð hvussu lond, kommunistisk og eisini muslimsk miðvíst brúka hatur móti øðrum londum og fólkum í undirvísing og uppaling.

Vit í sokallaða siviliseraða Vesturheiminum eru altíð so skjót at døma onnur við øðrum mentanum og stýrum. Vit eru heppin at liva í demokratiskum samfeløgum, og eiga tí eisini at vera á varðhaldi og krittisk móti totaliterum stýrum. Men vit hava eisini eina skyldu at taka í egnan barm. Hvussu er t.d. stætt í okkara egna bakgarði, tá tað um skotvápn ræður! Tað gav sending í danska TV2 í vikuni eitt gott boð uppá.

Í USA,"Gods own country", uppala foreldur børn síni longu frá fimm ára aldri til at gerast meistarar í skotvápnum, ja rætt og slætt til at elska vápn. "Eg tími ikki at ganga í skúla. Tað er nógv stuttligari og lættari at spæla við vápn, tí tá sleppur tú undan at hugsa" var eitt av úttalilsunum hjá amerikonskum gentubarni í hesum avdúkandi filmi. Í filminum fylgja vit familjum, har øll hugsandi skotvápn frá pistólum til hópdrepandi maskinbyrsur verða latin upp í hendurnar á børnum teirra. Hesi verða lærd upp at brúka og elska hesi vápn. Endamálið sigst vera, at tey frá barnsbeini skulu læra av verja seg móti kriminellum innbrotstjóvum, sum kanska einaferð í framtíðini vilja gera seg inn á tey.

Vit hava sæð, hvussu amerikanskir ungdómar fleiri ferðir hava brúkt sín førleika at handfara somu skotvápn móti øðrum ungdómum. Øll minnast vit ræðuligu drápini seinastu árini á amerikonskum universitetum, har ungdómar vælvandir við at brúka skotvápn hava dripið frá hond.

Stóra kjakið í USA er, um tað skal verða loyvt nærum øllum borgarum at eiga vápn. Hetta er tó so grundfest í amerikonsku fólkasálini, at tú hevur ilt við at verða valdur til høgstandandi embæti er tú ímóti fríari sølu av vápnum. Í dag hava 60 mill. amerikanarar vápn. Túsundtals børn og ung doyggja av ósketni hvørt ár. Skjótimaniin ella skjótivápnabasillan er vorðin so inngrógvin og útbreidd, at tað er vorðin gerandishending at brúka vápnini, ja fólk himprast ikki við at brúka skotvápnini og sín førleika at skjóta niður onnur tú er ósamd ella ónøgd við.

**Sosialurin**

## Hvat gerst tú?



BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN
Løgtingskvinna
Tjóðveldi

Tað var í tøkum tíma, at vit fingu arbeiðsloysisskipanina, sum í dag kann sigast at vera ein sólskinssøga. Seinastu mongu árini er eginognin hjá stovninum vaksin, meðan talið av arbeiðsleysum støðugt er minkað. Talið á arbeiðsleysum er framvegis lágt, men nú er tað hægri enn somu tíð í fjør.

Mær dámar sera væl, at øll rinda inn og sostatt eisini hava rætt til útgjald sammett við, at tú sjálv/ur gerst av, um tú vilt vera limur av einum arbeiðsloysiskassa.

Nú heimskreppan kom sum eitt omanlop eisini í grannalondunum eru mong tikin á bóli, tí tey gjørdist arbeiðsleys og ikki vóru limir í arbeiðsloysiskassa.

Summi halda seg gjalda ov nógv. Til tað er at siga, at undir truplu árunum 1993-1997 var inngjaldið 2,75%, meðan tað í dag er 1%. Summi minnast enn, at ALS mátti út at lána pening til útgjald, sum eitt skifti fór niður í 67% av eini arbeiðsmannaløn. Hugaligari er at ALS eigur slakar 650 mió. kr.

### Hvat gerst tú?

Sum virkisráðgevi havi eg tosað við 100-tals arbeiðsleys fólk. Lagnur og orsøkir vóru ymiskar. Arbeiðssamleikin var týdningarmikil hjá flestøllum eins og hjá øllum øðrum.

Hvussu mong okkara hava ikki fingið ella sett spurningin "Hvat gerst tú?" sum tann fyrsta, tá vit tosa við fólk, vit ikki kenna. Tá vit so fáa svarið, gera vit okkum eina mynd av persóninum – alt eftir, hvat svarið er. Tað er trupult ikki at hava eitt starv, serliga um talan er um longri tíðarskeið.

### Er arbeiðið alt?

Peningur er neyðugur, men eisini kenslan av at brúk er fyri mær - eisini á arbeiðsplássinum, eg geri ein mun, eg havi starvsfelagar sum eg havi tað gott saman við og avbjóðandi uppgávur. Eisini status kann hava sera stóran týdning.

Men arbeiðið er als ikki alt. Umráðandi er sjálvsagt, at hava onnur virði í lívinum enn júst arbeiðið. Hetta var eisini boðskapurin hjá Føroya biskupi í samrøðu við útvarpið fyri jól. Sjálvandi eru onnur virði størri t.d.: familja, vinfólk og ein góð heilsa. Hetta ljóðar einfalt, men er tað ikki. Tí hvussu við hesum virðum, um eg missi hús og heim? Mær dámar betur um vit megna tað stavhald, at arbeiðið er ein mannarættur hjá øllum.

### Rúmligi arbeiðsmarknaðurin

At arbeiðið eigur at vera ein mannarættur hjá øllum – eisini teimum við skerdum arbeiðsførleika – mugu vit eisini tryggja, tá arbeiðsloysið er vaksandi. Tí júst tey við skerdum førleika kunnu hava truplast við at finna nýtt starv, um tey gerast arbeiðsleys. Tí mugu skipanirnar, lógarverk og hjálp frá tí almenna vera smidligar. Og lógarkarminum tørvar ábøtur í mun til rúmliga arbeiðsmarknaðin. Bæði til tess at fyribyrgja at fólk missa arbeiðið vegna skerdan arbeiðsførleika, og í mun til at fáa tey við skerdum førleika inn á arbeiðsmarknaðin. Tjóðveldi hevur fleiri uppskot í mun til júst hetta og vónar, at samgongan ynskir samstarv um júst rúmliga arbeiðsmarknaðin.

### ALS útgjald, hvussu leingi?

Umráðandi er, at fólk fáa nýtt arbeiði ella fáa útbúgving í boði sum skjótast, tá tey gerast arbeiðsleys. Tað er so langt síðani prógvað, at longri arbeiðsloysið varar, truplari er at koma koma aftur í starv. Tí kundi veri vert at umhugsa í hesum sambandi at minka dagatalið til 24 mánaðar, soleiðis sum tað var, tá skipanin byrjaði.

### Hækkað ALSútgjald = arbeiðsmarknaðarpolitikkur?

Eg haldi tað vera eitt gott hugskot at hækka ALSútgjaldið. Men løgið var tað, fyrst at hoyra løgmann nærmast geva Føroya fólkið lyftið um hetta, fyri so at koma afturumaftur og siga, at tað sjálvandi skuldi tosast við stýrið, tí tað skuldi ikki takast av ræði!

Sum eg hoyrdi røðuna, var tað at hækka ALS gjaldi einasta boð upp á arbeiðsmarknaðarpolitikkin hjá sitandi samgongu.

Vinnumálaráðharrin heitir á stýrið fyri ALS um at fremja tillagingar í ALS-skipanini. Vit vita at ein arbeiðsbólkur í 2005 gjørdi eitt álit um broytingar í ALS skipanini. Hesar eru enn ikki viðgjørdar á tingi. Sera óvirðiligt eftir mínum tykki.

### Veruligur arbeiðsmarknaðarpolitikkur

ALS-gjaldið er sjálvsagt týdningarmikið. Men tað er annað í er umráðandi, tá um ALS ræður.

Hvussu tryggja ikki minst teim ungu skjóta og góða viðgerð, so tey koma úr aftur skipanini sum skjótast?

Hvussu við teimum sum eru í skipanini, men hava aðrar trupulleikar umframt arbeiðsloysið?

Hvussu hjálpa vit hesum best?

Skulu vit gera meira við at eggja arbeiðsleysum til útbúgving og á hvønn hátt?

Skal útbúgvingar – og arbeiðsmarknaðarpolitikkur ikki samskipast betri?

### Útbúgving, útbúgving, útbúgving

Í mun til útbúgving kann sitandi samgonga als ikki breiða upp á seg. Tað vísti fíggjarlógin so syrgiliga. Vóni at samgongan endurskoðar – eisini - tann partin av fíggjarlógini. Tey, ið gerast arbeiðsleys hava flest starvsmøguleikar, um tey hava eina útbúgving, og fleiri starvsmøguleikar latast upp, um fólk fáa eina útbúgving. Her er ein orsøk aftrat til ikki at niðurpína útbúgvingarstovnar ella nokta pening til nýggjar útbúgvingar.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.